# n gerast ein marra



*- Globaliseringin er ikki eitt frítt val. Øll eru umborð, hóast vit vilja tað ella ikki. Spurningurin er so, um vit gerast vinnarar ella taparar í hesum spæli. Uttan umfatandi reformar á fleiri økjum kann ár 2015, tá vit sambært Føroya Landsstýrið skulu vera millum heimsins førandi tjóðir, skjótt gerast eitt ræðani árstal, siga føroysku vinnulívsrisarnir í Íslandi, Jákup Jacobsen (omanfyri), og Niels Stórá (niðanfyri)*

*Mynd: Bárður Lydersen*

íslendska samfelagnum, gjørdu íslendarar fyrst í nítiárunum eina fýra ára langa tjóðarsemju millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum. Eitt kompromis, har allir partar fingu nakað, og ein semja, sum noyddi partarnar at binda frið. Við hesum komu íslendarar teimum mongu verkføllunum til lívs, greiðir Niels frá. Hann leggur afturat, at íslendarar longdu sáttmálan fýra ár afturat, eftir at fyrstu fýra árini vóru runnin, og henda tjóðarsáttin, sum hevur stabiliserað íslendska arbeiðsmarknaðin, hevur sambært Niels tænt íslendska vinnulívinum.

- Ein slíkur høvuðssáttmáli á arbeiðsmarknaðinum, sum forðar fyri kostnaðarmiklu verkføllunum, er neyðug at seta í verk í Føroyum, slær Niels fast.

## Hugburðsbroyting

Jákup Jacobsen og Niels Stórá fylgja spentir við 2015-ætlanini, sum Føroya Landsstýrið fyri stuttum hevur lanserað. Teir meta tað vera gott at leggja langsiktaðar ætlanir, og teir bíða við áhuga eftir, hvørji ítøkilig stig sitandi samgonga tekur, um Føroyar skal vera millum heimsins fremstu tjóðir í 2015. Men vinnulívsmenninir í Íslandi eru ikki bjartskygdir. Jákup sigur, at tað av og á tykist sum um, at føroyingar mugu á botn, áðrenn teir vakna. Og tað metir hann vera synd fyri eina tjóð, sum hevur so nógvar møguleikar.

- Tað eru tríggir møguleikar, um 2015-ætlanin skal gerast veruleiki. Antin gerst oljudreymurin veruleiki, ella kunnu vit leggja okkum at bíða eftir einum gýtingarstovni á føroysku havleiðini, sum er so stórur, at hann kann gera okkum rík. Triði møguleikin er at stinga nýggjar ætlanir út á kortið, og tað er sjálvandi hetta, vit eiga at gera, sigur ein ironiskur Jákup, áðrenn hann heldur fram.

- Fyri tíggju árum síðani var íslendski búskapurin eins einstáttaður og tann føroyski. Fiskurin var alfa og omega. Í dag kemur ein hálv milliard krónur í íslendska landskassan av útflutningi av "software" (teldulutum), privata bankavinnan kastar øgiligar inntøkur av sær, ikki minst tí bankarnir eru villigir til at spæla við sum aktivir íløguaktørar, heilivágur er vorðin ein heil útflutningsvinna, og umframt hetta kunnu vit nevna aðra teldutøkni, transport og ferðavinnu sum etableraðar vinnur í Íslandi. Alt hetta orsakað av eini íslendskari hugburðsbroyting, sigur Jákup Jacobsen, sum eftirlýsir meiri dirvi og áræði í føroyskum vinnulívi.

- Alt byrjar jú við, hvønn hugburð eitt fólk hevur. Men onkuntíð mást tú broyta skipanina fyri at broyta fólksins hugburð, og hetta er fremsta ábyrgdin hjá føroysku myndugleikunum, sigur føroyski verðinsmaðurin í Íslandi.

Við øðrum orðum er globaliseringin ikki eitt frítt val. Øll eru umborð, hóast vit vilja tað ella ikki. Spurningurin er so, um vit gerast vinnarar ella taparar í hesum spæli.

## Akademiskt fjølbroytni

Niels Stórá og Jákup Jacobsen eru á einum máli um, at ein høvuðsfortreyt fyri menning er eitt høgt útbúgvingarstøði, og ikki minst er týdningarmikið at hyggja at, hvussu útbúni parturin av fólkinum verður nýttur á arbeiðsmarknaðinum. Men fyrst og fremst eftirlýsa teir báðir, at útbúni føroyingurin eisini kagar út um ríkisfelagsskapin.

- Íslendsku myndugleikarnir eru m.a. farnir aktivt inn í útbúgvingarprosessina og hava eggjað ungdómin at nema sær útbúgving aðrastaðni enn í Íslandi, hóast vit hava eitt frálíkt íslendskt universitet. Ein triðingur fer til USA, og hesin parturin klárar seg serliga væl. Ein triðingur er ymsastaðni kring Europa, og seinasti triðingurin er í Íslandi. Hetta skapar eina globala tilvitsku, ein breiðari vinkul, sum als ikki er at síggja í Føroyum, tí nógv tey flestu útbúgva seg á einum og sama staði, nevniliga í Danmark, sigur Niels Stórá. Sostatt metir Niels, at føroyskir myndugleikar í størri mun áttu at eggjað ungum føroyingum at leita sær út um ríkisfelagsskapin, tí fjølbroytt vitan og spesialisering er vegurin fram.

Ein annar útbúgvingarligur trupulleiki er sambært Niels, hvussu føroyingar nýta sína akademisku megi.

- Alt ov nógvir føroyingar enda í almenna sektorinum, tá teir koma heim eftir lokna útbúgving, og reint fíggjarligt kastar tað jú einki av sær. Meðan meginparturin av teimum útbúnu enda í almenna sektorinum í Føroyum, er tað beint øvugt í Íslandi. Har er privata vinnan tann attraktiva, og tað er í privata sektorinum, at útbúni íslendingurin leitar sær. Sjálvsagt skal ein partur av akademisku megini nýtast í almennari umsiting, men í Føroyum er býtið av akademiska tilfeinginum alt ov illa umbýtt millum tað almenna og tað privata, metir Niels Stórá.

Og Jákup leggur afturat, at almenna fyrisitingin í Føroyum í roynd og veru er alt ov stór.

- Í einum landi við 45.000 íbúgvum er fyrisitingin í Føroyum alt ov stór og kostnaðarmikil. Almennu Føroyar bera á sínum herum eitt alt ov tungt apparat, og tí eru rationaliseringar í fyrisitingini neyðugar, metir Jákup.

Í samband við útbúgving og vitan skoytir Jákup uppí, at føroyingar eisini mangla hagtøl. Í londunum kring okkum eru hagtøl tann mest vegleiðandi mekanisman, tá nýggjar ætlanir skulu stingast út í kortið, og tí eiga fleiri máti-instrument at nýtast í politiska arbeiðinum og í almenna kjakinum. Tað fyriliggja bert nøkur yvirornað tøl um føroyska samfelagið, men vit mangla við reinum tølum at hyggja nærri at okkum sjálvum og okkara kappingarneytum, tí einki er í veruleikanum meiri sigandi og avdúkandi enn tøl, sigur Jákup Jacobsen. Hann metir, at uttan fleiri tøl á borðið hava vit sum veljarar ongan møguleika at hava eftirlit við, hvussu væl politiski myndugleikin røkir sítt arbeiði, og uttan ítøkilig tøl hava vit ikki grundarlag at fara á val fjórða hvørt ár. Og viðvíkjandi hesum nevnir Jákup ein annan trupulleika, sum er at finna í okkara valskipan.

- Okkara valskipan við so nógvum valdømum hevur við sær, at ein meiningsleysur og kostnaðarmikil føroyskur lokalpolitikkur hevur fríar ræsur, og tí mugu vit fyri alt í verðini fáa eitt savnað valdømi, so ineffektivi lokalpolitikkurin kann halda uppat, metir Jákup.

## Liberalur vælferðarstatur

Tað er ikki at fara skeivur av, at Niels og Jákup umboða nøkur politisk og búskaparlig sjónarmið, sum eru eyðkend av grundsúlunum í eini klassiskari liberalistiskari hugsan við øllum teimum gomlu setningunum um fríari kapping, fríar marknaðarkreftir, minni statsinterventión, minni alment, meiri privat o.s.fr. Fyri sosialdemokratisku flokkarnar er stóri spurningurin, hvussu slíkir reformar ávirka vælferðarstatin og almennu vælferðartænasturnar. Og tað er júst á hesum øki, at vinstrivongurin stillar seg skeptiskt á bakbeinini og tekur liberalistiska paradísið við fyrivarnum. Men sambært Jákupi og Niels nýtist ein liberalur búskaparpolitikkur als ikki at redusera vælferðina. Tvørturímóti.

- Tað snýr seg jú um, hvør keypsorka er eftir fyri hvønn einstakan, og samstundis sum vit vilja gera tað bíligari at framleiða, vilja vit eisini gera tað bíligari at liva og forbrúka. Íslendski arbeiðarin hevur størri keypsorku enn nakrantíð, sigur Jákup, og Niels leggur afturat.

- Men so mugu vit eisini liva við, at nakrir einstaklingar gerast sera ríkir, og tað er verri enn so altíð, at eitt fólk tolir at síggja nakrar einstaklingar strúka avstað við stórari succés, sigur Niels.

Teir eru samdir um, at tað heilt einfalt snýr seg um at løna teimum, sum hava hug at royna seg. At loyva teimum sterku at vera sterk, í staðin fyri at nullstilla allan kapasitet við tí úrsliti, at tær dygdir og tey evnir, sum eru í fólkinum, ikki verða gagnnýtt.

## 2015-marran

Í stuttum meta Niels Stóra og Jákup Jacobsen, at fleiri ítøkilig stig eiga at verða tikin, um talan ikki skal gerast um eina 2015-marru heldur enn einar framkomnar og liviligar Føroyar í 2015. Og við hesum hava teir báðir í øllum førum sent Føroya Landsstýrið nøkur greið signal, um Føroyar skulu vera eitt framkomið land um 10 ár.

Um hesi umfatandi boð uppá einar nýggjar Føroyar ikki verða implementeraðar, kann føroyska tjóðin sambært teimum báðum skjótt enda á botni og gerast ein aftursigldur bátur í globalu kappingini, og so kann 2015 sambært teimum báðum skjótt gerast eitt óhugnaligt árstal...

**Tíggju uppskot um 2015-visiónina:**

1. Umfatandi privatiseringar og fleiri millumtjóða skattasáttmálar
2. Flatur skattur á 13% fyri øll
3. Langsiktaðar bindandi tjóðarsemjur á arbeiðsmarknaðinum
4. Nýggj mátitól og fleiri hagtøl
5. Stórar skerjingar í almennu fyrisitingini
6. Økt útbúgvingarstøði uttanfyri ríkisfelagsskapin
7. Eitt savnað valdømi
8. 25.000 skattafríar krónur fyri alt íløguvirksemi komandi tvey árini
9. Fast vinningsbýti á átta prosent
10. Opnari handilssamstarv við ES